gult28 cyan28 magenta28 svart28



# AB og Silkeborg stríðast um Europa

**Danska steypafinalan verður sum vant leikt kristi himmalferðardag**

DANMARK
*Jóannes Hansen*

Kristi himmalferðardagur er steypadagur í Danmark. Í flestu londum eru traditiónir knýttar at fótbóltinum og ikki minst at steypakappingunum. Í Danmark er finalan í steypakappingini altíð í Parkini Kristi himmalferðardag, og soleiðis er tað eisini í ár.

Tað eru AB og Silkeborg, sum skulu stríðast um eitt pláss í UEFA Cup. AB hevur tríggjar ferðir áður verið í finaluni, meðan Silkeborg ongantíð áður hevur nátt so langt.

Álopsspælarin og toppskjúttin hjá Silkeborg, Henrik Pedersen, segði týsdagin á tíðindafundi í Parkini, at finalan ímóti AB verður næststørsta fótbólts avbjóðingin hjá honum. Størstu avbjóðingina helt hann tað vera, tá hann 16. august í fjør fyri fyrstu ferð spældi á landsliðnum. Tað var tá Danmark vann 2–0 á Føroyum á Tórsvølli.

Tað verður sagt úr Danmark, at tað framvegis væl sást á grasinum í Parkini, at Grand Prix finala var har fyri stuttum. Serliga har pallurin var, er tað framvegis berligt. Týsdagin vóru níggju túsund atgongumerki seld til finaluna. Í hesi vikuni hevur veðrið verið gott í Danmark, og heldur tað sær, so vera tað ivaleyst fleiri enn fimtan túsund áskoðarar til finaluna.

Silkeborg er næstfremst í superliguni, og AB er fjórði aftast. Men síðsta sunnudag vann AB í landskappingardysti 2–1 í Silkeborg.

# Helgi er nýggjur á landsliðnum

**Tað er greitt, at umframt Toda Jónsson verður heldur ikki liðformaðurin, Jens Kristian Hansen við ímóti Sveis og Jugoslavia**

LANDSLIÐ
*Jóannes Hansen*

Í gjár kunngjørdi Allan Simonsen, landsliðsvenjari, hvørjar átjan spælarar hann ætlar at hava við til heimadystirnar ímóti Sveis og Jugoslavia. Einki er at ivast í, at venjarin hevði viljað havt tveir spælarar, sum ikki eru ímillum teir átjan, ímillum tey fyrstu nøvnini á pappírinum.

Umframt Toda Jónsson, so er stórur saknur í liðformanninum tey seinastu árini. Vøddaskaðin hjá Jens Kristiani Hansen er so mikið álvarssamur, at tað tykist vera greitt, at B36 maðurin ikki verður førur fyri at spæla landsdystir um eina góða viku.

Í hópinum er ein spælari, sum ikki hevur spælt á landsliðnum áður. Ikki óvæntað hevur venjarin sent boð eftir Helga L. Petersen, sum í steypakappingini og serliga í fyrstu fýra umførunum í landskappingini hevur verið sera væl upplagdur á GÍ liðnum. Tað kundi sæð út sum um landsliðsvenjarin hevur úttikið GÍ spælaran, tá tað var greitt, at Todi Jónsson ikki verður við hesa ferð.

Helgi L. Petersen var í hópinum, tá Føroyar í 1997 á heimavølli vunnu 2–1 ímóti Malta. Helgi var á beinkinum allar 90 minuttirnar, og síðani tá hevur hann ikki verið í landsliðshópinum. Í blaðnum týsdagin segði Jógvan Martin Olsen, hjálparvenjari hjá Allani Simonsen, at teir tríggjar ella fýra ferðir høvdu sent boð eftir Helga, men at hann hevði borið seg undan. Í sama blaði segði Helgi, at nú var hann tøkur á landsliðnum, og í gjár sendi landsliðsvenjarin boð eftir honum.

Átjan manna landsliðshópurin sær hesa ferð soleiðis út: Jákup Mikkelsen, Herfølge BK, Jens Martin Knudsen, NSÍ, Óli Johannesen, Hvidovre IF, Hans Fróði Hansen, B68, Pól Thorsteinsson, B36, Johan B. Hansen, OB, Allan Mørkøre, HB, Øssur Hansen, B68, Fróði Benjaminsen, B68, Sámal Joensen, GÍ, John Petersen, B36, Julian Johnsson, Sogndal IL, Rógvi Jacobsen, HB, Jákup á Borg, B36, Kurt Mørkøre, Sogndal IL, Christian Høgni Jacobsen, NSÍ, Helgi Lamhauge Petersen, GÍ og Uni Arge, HB.

Fleiri av úttiknu spælarunum vóru ikki við í 1. deild sunnudagin, tí teir vóru skaddir. Uni Arge var ikki á HB liðnum ímóti VB, Julian Johnsson spældi ikki við Sogndal, og Pól Thorsteinsson noyddist at taka seg av vøllinum, tá B36 var í Gøtu.

Harafturat vóru onkrir spælarar ikki á vøllinum, tí teir vórðu ikki mettir at vera nóg góðir til besta liðið. Tað snýr seg um Kurt Mørkøre í Sogndal og Johan B. Hansen í OB.



*Í týsdagsblaðnum vísti Jógvan Martin Olsen á, at Helgi máttu geva eina útmelding. Hesum svaraði rituvikingurin aftur, og nú er hann so aftur í landsliðshitanum*

## Ov lættir

Onkrir av spælarunum, sum hava verið við tær síðstu ferðirnar, tykjast ikki at hava verið komnir upp á tal, tí teir eru so mikið skaddir, at teir hava ikki spælt síðstu vikurnar. Her hugsa vit um HB menninar Jóhannis Joensen og Andrew av Fløtum.

Súni Olsen, sum spælir í FC Zwolle í næstbestu deildini í Hollandi, er ikki úttikin. Hann var heldur ikki úttikin til dystirnar í Luksemburg og Russlandi, men tá Uni Arge gjørdist sjúkur, vórðu boð send eftir Súna Olsen.

Tveir spælarar, sum hava spælt nógv á landsliðnum, men sum ikki hava verið við tær síðstu ferðirnar, hava staðið seg væl í landskappingini, og tí kundi kanska roknast við, at boð fóru at verða send eftir teimum. Men Allan Simonsen tykist ikki halda, at tað longur er pláss fyri Jan C. Dam og Henningi Jarnskor ímillum teir átjan bestu føroysku spælararnar.

Landsliðsspælararnir skulu møta hósdagin í komandi viku. Tá fara teir at fyrireika seg til dystin ímóti Sveis, sum verður á Svangaskarði leygarkvøldið 2. juni, sum er hvítusunnuaftan, klokkan 19.15.

# Virgar varaskrivari

**Næsti maðurin hjá FSF aðalskrivaranum er læraralærdur og fer at taka við nýggja starvinum 1. juli**

UMSITING
*Jóannes Hansen*

Nú er tað greitt, hvør tað verður, sum skal røkja nýggja starvið í Fótbóltssambandinum. Fyrr í vár lýsti FSF eftir einum varamanni til aðalskrivaran. Ísak Mikladal segði fyri nøkrum vikum síðani her í blaðnum, at fleiri enn fimm umsóknir vóru til starvið, og nú hava teir í Fótbóltssambandinum gjørt av, at Virgar Hvidbro skal setast í starvið. Hann tekur við FSF starvinum 1. juli.



*FSF hevur sett Virgar Hvidbro sum varaskrivara*

Nýggi maðurin í FSF umsitingini er 33 ára gamal. Hann tók lærarprógv á Føroya Læraraskúla í 1995. Virgar er ættaður úr Klaksvík, og í fleiri ár var hann lærari í skúlanum við Ósánna. Tey seinastu árini hevur hann verið í starvið hjá Arbeiðseftirlitinum í Tórshavn, har Virgar er búsitandi.

Í umsitingini hjá Fótbóltssambandinum eru nú trý fólk í føstum starvi. Umframt aðalskrivaran og nýggja varamannin er Guðrið Joensen á FSF skrivstovuni. Jógvan Martin Olsen, sum hevur ábyrgdina av øllum ungdómslandsliðunum og sum er hjálparvenjari hjá Allani Simonsen, er eisini í fulltíðarstarvi hjá FSF.

gult29 cyan29 magenta29 svart29



# Einki er avgjørt enn

**Hóast B36 vann ein uppibornan og hampuliga tryggan sigur í fyrru hálvfinaluni, so tykist einki vera avgjøt undan seinna dystinum móti grannunum**

HÁLVFINALA
*Jákup Mørk*

At siga at tey í B36-húsinum vóru fegin, tá tað dýra biðjudag loksins eydnaðist at vinna ein týðandi dyst móti HB, er einki at siga til. Sum nevnt ta ferðina, so er hetta ikki hent síðani 1991, tá B36 vann á grannunum í steypafinaluni.

Hvussu stórur týdningurin av sigrinum hesa ferð er, ber tó ikki til at siga, fyrr enn seinna hálvfinalan eisini er fingin frá hondini, og nógv er, sum bendir á, at talan verður um eina sera torføra uppgávu hjá B36.

## Fleiri ivamál

Sum støðan var mikudagin, var nevnliga ivasamt, í hvønn mun B36 liðið verður skert til dystin. Við vissu kann staðfestast, at Arnbjørn Danielsen, sum hevur týdningarmikla leiklutin á aftasta manni, ikki verður við, tí hann er leikbannaður.

Harafturat hava bæði Jens Kristian Hansen og Pól Thorsteinsson drigist við skaðar seinastu vikurnar. Jens Kristian var tó og vandi týskvøldið, og hetta gekk somikið væl, at hann roknar við at vera tøkur hósdagin. Við Pól var heldur meira ivasamt. Hann hevur verið til kanningar hjá fysioterapeuti, men enn er ikki staðfest, um talan er um eina fipuspreinging, ella um vøddarnir í lærinum bara eru strektir ov nógv.

Tá vit mikudagin tosaðu við Jens Kristian Hansen, segði hann annars, at tað avgjørt ikki verður nakar verjufótbóltur, sum B36 fer at spæla, hóast teir eru framman fyri við tveimum málum.

- Vit fara so avgjørt inn fyri at vinna. At liggja í verjustøðu í samfullar 90 minuttir fyri at verja tvey mál, er alt ov vandamikið, og kann gerast reint sjálvmorð fyri okkara viðkomandi, heldur hann.

## Tað sama í HB

Tað eru tó ikki bert teir svørt/hvítu, sum merkja sviðan av skaðum undan seinnu hálvfinaluni. Hjá HB er støðan á leið hin sama, og í øllum førum er vist, at hvørki Jóhannis Joensen ella Andrew av Fløtum eru við í hópinum.



*Fyri fjórðu ferð í ár hittast B36 og HB í steypakappingini, og alt bendir á, at dysturin hósdagin verður tann mest spennandi av hesum fýra*

Harafturat er í løtuni ivasamt, um Uni Arge verður tøkur. Landsliðsmaðurin hvíldi seg, meðan liðfelagarnir vunnu á VB, men enn er ógreitt, hvussu álvarsligur skaðin í lærinum er. Í vikuni hevur hann ikki vant við fullari ferð, men bert runnið sjálvur. Tað telir helst eisini við, at landsliðsuppgávur standa fyri framman, og at Uni tí helst ikki vil vága ov nógv, bert eina viku undan hesum.

Annars vónar liðskiparin hjá HB, Rúni Nolsøe, at tað fer at bera til hjá HB at vinna tey bæði málini innaftur.

- Tað er so í øllum førum tí, sum vit mugu royna eftir. Eg má viðganga, at tað sær eitt sindur svart út, men ógjørligt eigur hetta á ongan hátt at vera.

Hagtalsliga er einki at ivast í, at møguleikin er til staðar hjá HB. Sum nevnt, so hevur B36 ikki vunnið týðandi dyst á HB síðani 1991, og hósdagin kl. 16.45 kann staðfestast, um talan var um ein týðandi sigur dýra biðjudag, ella um alt stríðið kundi gera tað sama.

# Trygvi skal verja NSÍ málið

**Bæði í Runavík og í Klaksvík eru fleiri spælarar ivasamir undan seinnu hálvfinaluni**

HÁLVFINALA
*Jóannes Hansen*

Jens Martin Knudsen er leikbannaður, tá NSÍ Kristi himmalferðardag skal royna at spæla seg í steypafinaluna. At landsliðsmaðurin ikki verður við er sjálvandi sera óheppið fyri teir í Runavík.

Tá vit vóru í sambandi við NSÍ, var tað ikki heilt greitt, hvør skal verja málið hjá teimum ímóti KÍ. Tríggir málverjar hava verið til venjingar í vikuni. Tveir av teimum hava verið unglingamálverjin Jákup Helgi Hansen, sum tær seinastu ferðirnar hevur verið í málinum í 2. deild, og Annfinn Thomsen, sum í fleiri dystum í fjør vardi málið hjá Sumba í 1. deild, og sum hevur verið málverji hjá NSÍ í unglingadeildini og onkuntíð í 2. deild.

Triði málverjin, sum hevur verið á vøllinum við Løkin í hesi vikuni, er Trygvi Mortensen. Í síni tíð var hann ein tryggur aftasti skansi á besta liðnum hjá NSÍ, men nú eru fleiri ár síðani, at hann var fastur málverji.

Í fjør og í fyrraárið var Trygvi Mortensen venjari hjá NSÍ. Higartil í ár hevur hann vegna stóra arbeiðsbyrðu hildið seg burtur frá fótbóltinum (hann hevur kortini hugnað sær í 5. deild). Men nú felagið hjá honum so at siga var í neyð, hevur veteranurin einki havt ímóti at veita eina hjálpandi hond, og heilt nógv bendir á, at tað verður Trygvi, sum verður síðsti NSÍ skansin ímóti KÍ.

NSÍ hevur verið nógv í eldinum seinastu vikurnar, og tað sæst aftur í skaddum spælarum. Christian Høgni Jacobsen var ikki við í Klaksvík síðsta sunnudag. Í hesi vikuni hevur hann ikki vant saman við liðfeløgunum, men teir í Runavík vóna, at hann verður tøkur ímóti KÍ.

Gert Langgaard fekk ein løst í Klaksvík. Hann hevur ikki vant saman við hinum í hesi vikuni, og vit skilja á lagnum, at hann er sera ivasamur. Jónstein Petersen noyddist at taka seg burturúr venjingini týskvøldið. Brynjolvur Nielsen var so mikið illa fyri sunnudagin, at hann var ikki førur fyri at byrja inni ímóti KÍ. Týskvøldið var hann í Vágum við NSÍ unglingunum, og teir rokna við, at hann verður førur fyri at spæla í hálvfinaluni.

## Ivasom vinstra síða

Hjá klaksvíkingum hava fyri tað mesta Fríðin Ziskason ella Símun Joensen røkt ytsta plássið í vinstru. Teir eru báðir sera ivasamir undan hálvfinaluni. Fríðin var ikki við sunnudagin. Hann hevur verið plágaður av fótskaða, sum hann fekk undir venjing í síðstu viku. Mánakvøldið royndi hann at venja, men tað bar einki til, og týskvøldið vandi hann uttan bólt. Símun Joensen hevur fyrr í vár drigist við ein vøddaskaða, sum nú aftur argar.

Ove Nysted hevur ikki verið á vøllinum, síðani hann varð skaddur í fyrru hálvfinaluni, og hann verður ikki við í Runavík. Á pluss síðuni hjá KÍ telur tað, at Atli Danielsen, sum hevur verið burturi frá orsaka av bruna í beininum, í hesi vikuni hevur vant saman við hinum.

## Bíða leingi

NSÍ hevur ongantíð verið í finaluni, síðani tað í 1989 var farið undir at kappast um løgmanssteypið. 6. juli Í 1986 var ein fagnaðurdagur hjá NSÍ. Tá spældu teir finaluna um ísafjarðarsúluna í Gundadali. Mótstøðuliðið var LÍF, og NSÍ vann 2–1. Jens Martin Knudsen vardi NSÍ málið ta ferðina. Nú er hann leikbannaður. Trygvi Mortensen var ta ferðina útispælari hjá NSÍ. Hesa ferð skal hann verja málið. Eingin av hinum, sum í ár manna NSÍ liðið, hevur verið við í steypafinalu. Umframt í 1986 hevur NSÍ eina aðru ferðina verið í steypafinaluni. Tað var í 1985, tá teir taptu ímóti GÍ.

Klaksvíkingar hava fleiri ferðir verið í steypafinalum í níti árunum. Teir vunnu finalurnar í 1990, 1994 og í 1999, og tá teir fara til Runavíkar at telvast um finalupláss, men 1994 hálvfinalan standa frammarlaga í huganum. Tað árið vann NSÍ fyrru hálvfinaluna í Klaksvík 2–1. Men KÍ vann 4–1 í Runavík. Tá fyrra hálvfinalan næstsíðsta sunnudag var í Klaksvík, var úrslitið 1–1.

# Síggið FCK-Brøndby

**50 føroyingar fáa nú møguleika at ogna sær ferð og atgongumerki til stórdystin millum FCK og Brøndby**

FÓTBÓLTSFERÐIR
*Jákup Mørk*

Einki er at ivast í, at áhugin fyri dystin millum FCK og Brøndby hin 10. juni, er sera stórur. Forsølan av atgongumerkjum er langt síðani byrjað, og alt bendir á, at atgongumerkini nú eru um at vera uppi.

**Ferð fyri 2.000 kr.**
Fyri fótbóltshugaðar føroyingar er tað tí helst ein kærkomin møguleiki, at Atlantic Airways og North Atlantic Football Agency (NAFA) hava fingið hendur á 50 atgongumerkjum til dystin, so føroyskir áskoðarar eisini kunnu sleppa til dystin.

Í felag hava hesi feløgini nú gjørt eina pakkaferð, har tú fyri knappar 2.000 kr. fært flogseðil til Keypmannahavnar og aftur, umframt atgongumerki til dystin. Flogið verður úr Føroyum hóskvøldið, 7. juni kl. 20.30, meðan fráferðin heim aftur verður úr Keypmannahavn mánamorgunin. Tekning til ferðina fer fram á skrivstovuni hjá Atlantic Airways, sum eisini eru fús at hjálpa, um luttakararnir ynskja at gista á hotelli tær fýra næturnar í Keypmannahavn.

Lítið er at ivast í, at áhugin fyri ferðini er stórur. Tá Herfølge við Jákupi Mikkelsen í fjør gjørdist danskir meistarar, fóru hópatals klaksvíkingar til Danmarkar at síggja seinasta dystin á árinum, sum var móti júst FCK.

Hetta er fyrsta royndin hjá NAFA at skipa fyri slíkum fótbóltsferðum, men gongst eftir ætlan, verður tað so avgjørt ikki seinasta ferðin. Tosað verður millum annað um at gera ferðir til Onglands, tá flúgvingin hjá Atlantic til Bretland verður uppafturtikin.